# TINGLIMIR VILJ IKKI NIÐUR Í L

**TINGMANNALØNIR** Løgtingslimir eru ikki sinnaðir at lækka sínar egnu lønir fyri at ganga undan sum góðar fyrimyndir, nú tað er greitt, at hvør tann einasti borgari í landinum hevur merkt sviðan og fer at merkja enn meiri sviða av sparitiltøkum, sum verða sett í verk

Áki Bertholdsen
Leo Poulsen
Randi Jacobsen



Nú allir borgarar í landinum fara at verða merktir av álvarsligum sparitiltøkum, eiga politikarar fyrst at lækka sínar egnu lønir fyri at ganga undan sum góðar fyrimyndir.

Tað førdi Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin fram í Sosialinum herfyri.

Hann vil sostatt sostatt fegin ganga í fótasporunum á politikarum í Onglandi og ráðharrum í Danmark, sum hava lækkað sínar egnu lønir fyri at vísa samhuga við fólkinum, nú álvarslig inntriv skulu gerast fyri at fáa búskapin aftur á beint.

- Eg eri fullgreiðir yvir, at hetta eru bara piparnøtur, men tað hevur eitt signalvirði sum vísir, at politikarar eru sinnaðir at ganga á odda í teimum inntrivum, sum skulu gerast, segði Kári P. Højgaard.

## Tinglimir siga nei

Men eitt spurnarumfar, sum Sosialurin hevur gjørt í Løgtinginum, vísir, at Kári P. Højgaard hevur ongan møguleika at fáa undirtøku fyri sínum sjónarmiði.

Tað eru bara 12 tinglimir, sum taka undir við at lækka lønirnar hjá politikarum eini 5% - 10%.

Hinvegin siga 16 tinglimir nei, til at lækka lønirnar hjá politikarunum, samstundis sum onkur einstakir ikki vilja svara.

Trimum tinglimum fingu vit ikki fatur.

Sum tað sæst í greinini yvirav, hava tinglimir ymsar grundgevingar fyri at vera fyri ella ímóti einum slíkum uppskoti.

Summir halda, at hetta er bara upp á kvamsvís, men aðrir siga, at verða allar almennar lønir lækkaðar skulu tingmannalønirnar sjálvandi fylgja við.

## Skapar álit

Kári P. Højgaard umhugsaði annars at leggja uppskot fyri Løgtingið um at lækka tingmannalønirnar

Hann heldur, at tað hevur stóran týdning at skapa álit ímillum politikarar og borgarar og at skapa forstáilsi ímillum fólk fyri at tað er neyðugt við inntrivum.

- Men sum støðan er nú, hevur vanliga fólkið onki forstáilsi fyri teimum inntrivum, sum verða gjørd. Fólkið hevur heldur ikki álit á politisku skipanina, og tað verður okkara fremsta uppgáva at byggja tað uppaftur, heldur hann.

Hann vísir á, at ein týðandi partur av røðuni, sum Ingeborg Vinther, forkvinnu í Føroya Arbeiðarafelag helt á altjóða arbeiðaradegnum, snúði seg júst um hvussu óvilligir politikarar eru at ganga undan at vísa ein góðan vilja til sparing, samstundis sum teir leggja stórar byrðar á onnur, eisini tey, sum hava minst framman undan.

Hann sigur, at hetta er eitt gott dømi um, hvussu stóran týdning tað hevur, at politikararnir ganga á odda, hóast talan er um piparnøtur.

aki@sosialurin.fo
leo@sosialurin.fo
randi@sosialurin.fo